Steffan Klein Poulsen
Vegna Miðflokkin

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fosturtøku (Fosturtøkulógin)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 199 frá 9. desember 2025 um fosturtøku (Fosturtøkulógin) verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1 verða orðini "í boði" strikað.

2. § 2 verður orðað soleiðis:

"Hóast freistin sambært § 1 er farin, kann ein kvinna fáa fosturtøku eftir 12. viku í viðgongutíðini uttan loyvi, um lív og heilsa hjá kvinnuni er í vanda, og vandin er læknaliga grundaður."

3. § 3, nr. 3 verður orðað soleiðis:

"3) vandi er fyri, at barnið orsakað av ættarbregði, sjúku ella skaða í móðurlívi fær álvarsliga likamliga sjúku,"

4. § 7, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Kvinnan skal hava fingið óhefta ráðgeving og stuðulssamrøðu fyri og eftir inntrivið. Ráðgevingin skal m.a. fevna um møguleikarnar fyri stuðli til at fullføra viðgongutíðina, fyri stuðli eftir, at barnið er føtt og at burturættleiða barnið."

5. Í § 7 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:

"*Stk. 2.* Í minsta lagi fimm dagar skulu vera ímillum ráðgevingina sbrt. stk. 1 og fosturtøkuna. Í hesum tíðarskeiði skal kvinnan hava í boði at fáa framt eina ultraljóðskanning."
Stk. 2 verður eftir hetta stk. 3.

6. § 9, stk. 2 og stk. 3 verða orðaði soleiðis:

"*Stk. 2.* Tá ið heilt serligar umstøður tala fyri tí, kann samráðið loyva, at samtykki sambært stk. 1 ikki skal innheintast.
Stk. 3. Tá ið heilt serligar umstøður tala fyri tí, kann samráðið geva loyvi til fosturtøku, sjálvt um samtykki sambært stk. 1 verður noktað."

7. § 10, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Læknin, sum fær umsókn um fosturtøku, skal upplýsa kvinnuna um og vísa henni til ráðgeving og stuðulssamrøðu sambært § 7."

8. Í § 14, stk. 2 verður “sálarfrøðingur” strikað, og í staðin verður sett: “gudfrøðingur”.

9. Yvirskriftin yvir § 17 verður orðað soleiðis:

“Ársfrágreiðing og hagtøl”

10. Í § 17 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:

“*Stk. 2.* Heilsustýrið savnar, viðger og almannakunnger hagtøl um fosturtøkur. Landsstýrisfólkið í heilsumálum ásetir nærri reglur um hagtøl og mannagongdir í hesum sambandi.”

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2027.

Almennar viðmerkingar
Um fosturtøkumálið og tær ósemjur, sum eru í hesum máli, verða kókað niður til kjarnuna, kann tað lýsast soleiðis: summi ynskja, at ófødda barnið skal hava lógartryggjaðan rætt til lív, meðan onnur ynskja, at mamman frítt skal avgera, hvørt hon ynskir fosturtøku ella ikki. Talan er um tvey sera mótstríðandi sjónarmið. Fleiri føroyingar liggja sjálvsagt onkrastaðni mitt ímillum hesi sjónarmið.

Í høvuðsheitum kann hetta sera grundleggjandi málið loysast á fýra hættir:

A. Ófødda barnið fær staðfest rættin til lív. Tað verður tí einans loyvt at fremja inntriv í móðurlívið, um lív stendur ímóti lívi. Við hesum fær ófødda barnið fulla verju í lógini, og kvinnan fær ikki nakran møguleika at velja fosturtøku.

B. Fosturtøka verður undir vanligum umstøðum ikki loyvd, men nøkur undantøk vera givin. Undantøkini kunnu fevna um heilsustøðu, revsiverd viðurskifti og onnur líknandi undantøk. Ófødda barnið fær við hesum partvísa verju í lógini, meðan kvinnan bert í ávísum førum kann velja fosturtøku.

C. Kvinnan avger sjálv, um hon ynskir fosturtøku treytað av eini skipaðari tilgongd við ávísum krøvum. Hesi krøv kunnu fevna um ráðgeving, bíðitíð, spurnarbløð og so framvegis. Við hesum fær kvinnan avgerðarrættin um fosturtøku, meðan møguliga verjan hjá ófødda barninum liggur í, at skipaða tilgongdin kann forða fyri ov knøppum avgerðum, sum kvinnan seinni angrar.

D. Kvinnan hevur púra frítt at velja fosturtøku uttan nakrir treytir upp til eitt ávíst vikutal. Barnið hevur við hesum onga verju í lógini upp til ásetta vikutalið.

Samanumtikið kunnu vit velja at staðfesta rættin til lív, bert loyva fosturtøku í serligum undantaksførum, geva kvinnuni avgerðarrættin við kravi um eina skipaða tilgongd ella at geva kvinnuni púra frítt velja fosturtøku uttan nakað krav innan ásett vikutal.

Uppskotssetararnir eru væl vitandi um, at tað eru nógvar nuansur og fleiri smálutir innan hvørja av hesum fýra loysnum. Tó lýsir hetta væl, hvar føroyska samfelagið í høvuðsheitum kann velja at lenda í hesum grundleggjandi málinum.

Tá ið gamla lógin varð avloyst av galdandi fosturtøkulóg, fóru vit frá loysn B og heilt niður til loysn D. Harvið bleiv eitt stig (C) lopið um í tilgongdini. Tá á sinni løgdu undirritaðu uppskot fram um at flyta Føroyar yvir í loysn A.

Við hesum uppskotinum fær Løgtingið tó ein møguleika at velja loysn C. Uppskotið verður lagt fram við teirri sannføring, at galdandi lóg víkir ov langt frá tí loysnini sum "miðal føroyingurin" ynskir sær.

Um lógaruppskotið

Við hesum lógaruppskotinum er tað framvegis kvinnan, sum ger av, um hon ynskir fosturtøku ella ikki. Tó verður sett sum krav, at kvinnan fær ráðgeving og umhugsanartíð, áðrenn hon tekur endaliga avgerð um fosturtøku. Harumframt skal kvinnan fáa í boði eina ultraljóðskanning í hesum tíðarskeiðinum.

Eisini verður skotið upp, at tær kvinnur, sum søkja um at fáa fosturtøku, púra anonymt skulu upplýsa, hvør orsøkin er til, at tær søkja um fosturtøku. Hetta fyri at skapa eitt føroyskt hagtalsgrundarlag, sum ítøkiliga vísir orsakirnar til, at kvinnur í Føroyum velja fosturtøku. Tá verður lættari hjá tí føroyska samfelagnum, alt frá landsins stjórn til áhugafelagsskapir, at seta inn á teimum røttu økjunum fyri at minka um talið av fosturtøkum.

Talan er um ein grundleggjandi etiskan spurning og mett verður, at tey ymisku viðkomandi sjónarmiðini eru enn betri umboðað við einum gudfrøðingi í samráðnum. Ein gudfrøðingur er ikki bert serfrøðingur í átrúnaði, men hevur útbúgving í m.a. etikki, menniskjasýni, virðisspurningum og so framvegis. Fyri at halda talið av limum í samráðnum niðri á fimm verður mett, at sálarfrøðingurin kann víkja, tí sálarfrøðiliga sjónarmiðið er nøktandi umboðað av eitt nú serlæknanum í psykiatri og øðrum í samráðnum.

Umframt omanfyri nevndu broytingar verður skotið upp at gera aðrar smáar tillagingar í galdandi lóg, sum skapa eitt sindur betri javnvág ímillum rættin til at velja fosturtøku og rættin til lív.

Viðkomandi hagtøl

Ein orsøk til at hetta uppskotið verður lagt fram er tann sterka søgan, sum tølini úr Danmark og Týsklandi fortelja okkum. Danmark hevur havt fría fosturtøku upp til 12. viku í nógv ár. Frá 1. juni 2025 bleiv hetta broytt til 18. viku. Í Týsklandi kann fosturtøka fremjast uttan revsing upp til 12 vikur eftir gitnað treytað av, at kvinnan hevur verið til kravda ráðgeving og hildið lógarásettu umhugsanartíðina. At sígggja til er lítil munur á hesum lóggávum, men tølini tala fyri seg. Fosturtøkurnar í Danmark eru næstan dupult so nógvar samanborið við í Týsklandi.

Framdar fosturtøkur pr. 1000 fødd børn				
Lóggáva:	**A***	**B**	**C**	**D**
Ár	**PL Pólland**	**FO Føroyar**	**DE Týskland**	**DK Danmark**
2016	2,9	38	125	234
2017	2,6	29	129	231
2018	2,8	36	128	233
2019	3	31	130	251
2020	3	43	129	244
2021	0,3	50	119	224
2022	0,5	43	141	256
2023	1,6	73	153	266
2024	3,5	73	157	268
2025	—	51	162	281

** Í Pólandi er fosturtøka loyvd, tá ið viðgongutíðin hóttir lívið ella heilsuna hjá kvinnuni, ella tá ið viðgongutíðin er úrslit av revsiverdum viðurskiftum sum eitt nú neyðtøku. Síðan 2021 er álvarslig sjúka ella brek hjá fostrinum ikki longur ein sjálvstøðug heimild til fosturtøku.*

Keldur:

Póland: Polska heilsumálaráðið og Centrum e-Zdrowia – fosturtøkutøl; Główny Urząd Statystyczny (GUS) – tøl fyri livandi fødd.

Føroyar: Hagstova Føroya – fosturtøkutøl og tøl fyri livandi fødd.

Týskland: Destatis / GENESIS – fosturtøkutøl og tøl fyri livandi fødd.

Danmark: Sundhedsdatabanken / Sundhedsdatastyrelsen – fosturtøkutøl; Danmarks Statistik – tøl fyri livandi fødd.

Taka vit tað stóru myndina, er tað ein púra greiður samanhangur millum lóggávu og tal av fosturtøkum. Jú linari lóggávan er, jú fleiri fosturtøkur verða framdar.

Tá ið talið av fosturtøkum verður viðgjørt í einum landi sum Pólandi, fer kjakið beinanvegin inn á talið av ólógligum fosturtøkum. Her eru vengurnir "Fyri lívi" og "Frítt val" als ikki samdir um, hvussu nógvar ólógligar fosturtøkur verða framdar, og tí liggja teirra metingar langt frá hvørjum øðrum. Sí talvuna niðanfyri.

Framdar fosturtøkur pr. 1000 fødd børn í Póllandi			
Ár	**Almennu tølini**	**Fyri lívi, meting***	**Frítt-val, meting****
2016	2,9	21–40	212–395
2017	2,6	20–38	202–376
2018	2,8	21–39	209–389
2019	3	22–40	216–403
2020	3	23–42	228–425
2021	0,3	21–43	242–453
2022	0,5	24–46	263–492
2023	1,6	27–53	295–552
2024	3,5	31–59	321–599

** Fyri lívi, metingin hjá pólska felagsskapinum Polskie Stowarzyszenie Obrońców Życia Człowieka (Polish Association of Defenders of Human Life) byggir á eina meting á 7.000–14.000 fosturtøkur árliga uttan fyri almennu skrásetingina, umframt tær alment skrásettu fosturtøkurnar.*

*** Frítt-val, metingin hjá pólska felagsskapinum FEDERA (Foundation for Women and Family Planning) byggir á eina meting á 80.000–150.000 fosturtøkur árliga uttan fyri almennu skrásetingina, umframt tær alment skrásettu fosturtøkurnar.*

Ítøkilig kelda har víst verður til tølini frá báðum vengurnum er Review of International Comparative Management, Vol. 18, Issue 5, 2017, s. 485.

Viðmerking: Tølini í teigunum frá Polskie Stowarzyszenie Obrońców Życia Człowieka og FEDERA eru ikki sjálvstøðugar metingar fyri hvørt einstakt ár. Sama árliga metingarspenni, ávikavist 7.000–14.000 og 80.000–150.000 er lagt afturat almennu fosturtøkutølunum og síðani roknað í mun til talið av livandi føddum tað árið.

Samanumtikið

Uppskotssetararnir hava eitt greitt ynski um, at ófødda barnið fær lógartryggjaðan rætt til lívið. Politiski veruleikin er tó soleiðis háttaður, at hetta sum er ikki kann fremjast.

Uppskotssetararnir ynskja tó at bjarga tí, sum bjargast kann. Hóast týska loysnin als ikki er fullkomin og ei heldur í samsvari við stevnuskrá Miðfloksins, tekur hon tó størri hædd fyri ófødda barninum samanborið við donsku loysnina. Galdandi lóg í Føroyum er meira ella minni eitt avrit av donsku lógini.

Hugsanin hjá uppskotssetarunum kann samanberast við, at tveir smádreingir eru farnir út á sundið, og at teirra bátur hvølvist. Maður stendur á bryggjuni, men hann hevur bert møguleika at bjarga øðrum dreinginum. Tað er ongin ivi um, at maðurin skal seta hesa bjarging í verk, hóast tað nívir ikki at fáa báðar dreingirnar á land.

Løgtingið fær við hesum uppskotinum møguleika at samtykkja broytingar í fosturtøkulógini, sum verða mettar at liggja væl tættari at tí loysnini, sum "miðal føroyingurin" ynskir sær.

Fíggjarligar avleiðingar av uppskotinum

Í uppskotinum um fosturtøkulóg, sum varð lagt fyri Løgtingið í mars 2024 (løgtingsmál 88/2023) varð mett, at neyðugt var at seta av umleið 150.000 kr. til ymisk endamál sambært lógini.

Í uppskotinum um fosturtøkulóg, sum varð lagt fyri Løgtingið í september 2025 (løgtingsmál 14/2025), og sum varð samtykt, varð hendan sama upphæddin mett at vera eitt vet hægri enn 150.000 kr.

Við teimum broytingum, sum verða framdar við hesum lógaruppskotinum, kann væntast, at kravda ráðgevingin hevur nakað hægri útreiðslur við sær, meðan broytingarnar, sum snúgva seg um ultraljóðskanningar og hagtalsgerð væntast at kunna rúmast innan verandi virksemið hjá ávikavist sjúkrahúsverkinum og Heilsustýrinum.

Serligar viðmerkingar

Til § 1

Nr. 1, 4 og 7
Í galdandi lóg er tað ikki eitt krav fyri at fáa fosturtøku, at kvinnan hevur fingið óhefta ráðgeving og stuðulssamrøður. Ráðgeving og stuðulssamrøður eru eitt tilboð til kvinnuna, sum henni ikki nýtist at gera brúk av. Læknin, sum kvinnan vendir sær til, hevur tó skyldu at tryggja sær, at kvinnan hevur fingið kunning og vegleiðing um sjálvt inntrivið, eins og læknin hevur skyldu til at upplýsa kvinnuna um, at hon kann fáa ráðgeving, um hon metir seg hava tørv á tí.

Við hesi broytingini verður tað eitt krav fyri at fáa fosturtøku, at kvinnan hevur fingið ráðgeving og stuðulssamrøður, og endamálið er at tryggja kvinnuni kunning og stuðul til at taka eina væl grundaða avgerð, um fosturtøka skal fremjast ella ikki.

Sambært viðmerkingunum til upprunauppskotið um fosturtøkulóg skuldi innihaldið í ráðgevingini skipast nærri í kunngerð ella leiðbeining, soleiðis at fakfólkini, sum skulu veita ráðgevingina, vita, hvat hon skal innihalda, og soleiðis at tryggjað verður, at allar kvinnur fáa nøktandi og eins ráðgeving og vegleiðing. Lagt verður ikki upp til at gera nakra broyting hesum viðvíkjandi aðra enn, at ráðgevingin verður kravd.

Sambært § 7, stk. 2 í galdandi lóg skal landsstýrisfólkið áseta nærri reglur um ráðgevingina, og sambært § 13 ásetir landsstýrisfólkið nærri reglur um umsókn um fosturtøku og um viðgerð av málum um fosturtøku.

Sambært serligu viðmerkingunum til § 7 snýr heimildin seg um óheftu ráðgevingina fyri og eftir inntrivið, og sambært serligu viðmerkingunum til § 13 snýr heimildin seg m.a. um mannagongdina, tá ið søkt verður um fosturtøku, t.d. við oyðubløðum, og um innihaldið í vegleiðingini og kunningini, sum kvinnan hevur krav uppá.

Omanfyri nevndu heimildarásetingar heimila landsstýrisfólkinum at áseta nærri reglur um mannagongdina fyri og innihaldinum í kravdu ráðgevingini, viðurskifti viðvíkjandi umhugsunartíðini og tilboðið um ultraljóðskanning samsvarandi teimum broytingum, sum við hesum uppskotinum verða gjørdar í § 1, § 7, stk. 1 og 2 og § 10, stk. 1 í galdandi lóg,

Nr. 2
Galdandi orðing av § 2 loyvir kvinnuni at fáa fosturtøku eftir 12. viku uttan loyvi um so er, at lív og heilsa hjá kvinnuni er í vanda, ella um inntrivið er neyðugt fyri at forða fyri, at likamliga og sálarliga heilsan viknar munandi, og vandin fyri hesum er læknaliga grundaður.

Við hesi broytingini verður tað frameftir bert møguleiki at fáa fosturtøku eftir 12. viku uttan loyvi um so er, at *lív og heilsa* hjá kvinnuni er í vanda, og vandin fyri hesum er læknaliga grundaður.

Í øllum øðrum førum verður málið at senda samráðnum til støðutakan eftir §§ 3 – 5.

Nr. 3
Sambært galdandi § 3, nr. 3 kunnu kvinnur fáa loyvi til at fáa fosturtøku eftir 12. viku, um vandi er fyri, at barnið orsakað av ættarbregði, sjúku ella skaða í móðurlívi fær álvarsliga *sálarliga ella likamliga* sjúku.

Við broytingini verður frameftir ikki møguligt at fáa loyvi til fosturtøku eftir 12. viku, um vandi er fyri, at barnið í móðurlívi fær álvarsliga sálarliga sjúku. Serligu viðmerkingarnar til upprunalógina hava einki boð uppá, hvussu tað kann verða staðfest hjá barni í móðurlívi, at vandi er fyri, at tað fær álvarsliga *sálarliga* sjúku.

Sambært serligu viðmerkingunum til § 3, nr. 3 í upprunalógini skal talan vera um eina ítøkiliga og læknafakliga meting, sum verður gjørd út frá støðuni hjá einstaka fostrinum og ikki út frá samfelagsligum atlitum. Hetta verður eisini galdandi frameftir, tá metast skal um, um vandi er fyri, at barnið vegna ættarbregði, sjúku ella skaða í móðurlívi fær álvarsliga *likamliga* sjúku.

Nr. 5
Ásett verður, at í minsta lagi fimm dagar skulu vera ímillum kravdu ráðgevingina sbrt. § 7, stk. 1 og fosturtøkuna. Í hesum tíðarskeiði skal kvinnan harumframt hava í boði at fáa framt eina ultraljóðskanning.

Víst verður til viðmerkingarnar til broyting nr. 1, 4 og 7 um heimildirnar hjá landsstýrisfólkinum at áseta reglur um mannagongdir o.a. í hesum sambandi.

Nr. 6
§ 9, stk. 1 ásetir, at um kvinnan er undir 18 ár, og hon ikki er gift, skal tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, geva samtykki til at søkja um fosturtøku. Hendan ásetingin verður óbroytt.

Sambært stk. 2 og 3 kann samráðið, *um umstøðurnar tala fyri tí* loyva, at samtykki ikki skal innheintast, og *tá umstøðurnar tala fyri tí*, loyva fosturtøku, sjálvt um samtykki verður noktað.

Við hesum broytingaruppskotinum verður treytin fyri, at samráðið skal kunna loyva, at samtykki ikki skal innheintast ella loyva fosturtøku, sjálvt um samtykki verður noktað herd, soleiðis at tað frameftir skal vera talan um *heilt serligar umstøður.*

Sambært broytingini skal *heilt serligar umstøður* skiljast sum sera álvarslig mál so sum at unga kvinnan er vorðin við barn sum úrslit av neyðtøku, blóðskemd o.tíl.

Nr. 8
Tað krevur serstakt loyvi at fáa fosturtøku eftir 12. viku, og sambært galdandi lóg tekur eitt samráð avgerð um tað eftir nærri ásettum treytum. Samráðið er mannað við løgfrøðingi, sosialráðgeva, sálarfrøðingi, serlækna í kvinnusjúkum og serlækna í psykiatri.

Verandi samanseting av samráðnum skal sambært viðmerkingunum til upprunalógina tryggja eina víðfevnda og gjølliga meting av fleiri ymiskum atlitum, sum eitt mál um fosturtøku má metast at viðføra. Metast skal um øll viðkomandi viðurskifti, áðrenn loyvi verður givið til fosturtøku.

Við hesi broytingini verður samráðið frameftir eisini mannað við einum gudfrøðingi, sum kemur í staðin fyri sálarfrøðingin.

Gudfrøðingurin kann eins og hinir limirnir í samráðnum verða settur eftir tilmæli frá viðkomandi myndugleika ella avvarðandi fakfelag.

Nr. 9 og 10

Ásett verður, at Heilsustýrið savnar, viðger og almannakunnger hagtøl, sum lýsa tal av fosturtøkum, aldur á kvinnunum, orsakir til, at biðið verður um fosturtøku og onnur viðkomandi viðurskifti í hesum sambandi.

Til samanberingar kann verða víst á, at samráðið skal á hvørjum ári senda landsstýrisfólkinum ársfrágreiðing, sum lýsir virksemið hjá samráðnum farna árið, undir hesum talið á umsóknum, tal av loyvum, hvørjar umstøður talan er um, og við hvørjari heimild avgerðir eru tiknar, viðgerðartíðin, nær í viðgongutíðini fosturtøkan varð framd, aldurin á kvinnuni o.a., sum kann metast at vera viðkomandi fyri at fáa yvirlit yvir støðuna.

Tað er landsstýrisfólkið í heilsumálum, sum ásetir nærri reglur fyri, hvørjar mannagongdirnar í hesum sambandi skulu vera. Fyri at fáa fosturtøku skal kvinnan útfylla eina umsókn um fosturtøku, samstundis sum hon skal vátta, at hon hevur fingið kunning, vegleiðing og ráðgeving. Tað kundi verið í hesum sambandi, at kvinnan navnloynt útfyllir eitt oyðublað við viðkomandi spurningum fyri hagtølini.

Til tess at tryggja anonymitetin hjá kvinnunum, eisini hóast upplýsingarnar verða latnar anonymt, skulu øll neyðug atlit takast, tá hagtøl verða almannakunngjørd.

Til § 2
Ásett verður, at broytingarnar í hesum lógaruppskotinum koma í gildi 1. januar 2027.

Á Løgtingi, 10. september 2026

Steffan Klein Poulsen

Fylgiskjal 1: Javntekstur